## Liverpool skiftir ikki hendur enn

Framvegis tingast eigarar av Premier League-felagnum, Liverpool FC, við eitt kuwaitiskt samtak um yvirtøku av felagnum, men ein talsmaður sigur, at núverandi eigararnir krevjar ov høgan prís. Amerikansku eigararnir, George Gillet og Tom Hicks, sum yvirtóku Liverpool FC fyri skjótt tveimum árum síðani, vilja hava fýra milliardir krónur fyri felagið, sum skyldar hálvatriðju milliard.



## Ítróttardómstólurin fer at gera skjótt av

– Ítróttardómstólurin hjá ÍSF fer at avgreiða kæruna hjá Neistanum so skjótt sum gjørligt, sigur Anja Hovgaard, forkvinna í ítróttardómstólinum, við 3-2. Hon væntar, at tey fara at fáa alt tilfarið í næstu viku, og so verður málið viðgjørt beinanvegin. Neistin hevur kært til dómstólin um avgerðina hjá Dómsnevndini hjá Hondbóltssambandinum, sum sigur, at Atlantic Airways-dysturin millum Neistan og VÍF í Havn tann 18. januar skal spælast umaftur, tí VÍF hevur kært um eitt fríkast, liðið kendi seg snýtt fyri, tá eitt mál var kolldømt. Neistin vann upprunaliga dystin við einum máli.

# Lykladysturin verður í Vági

**Úrslitið av dystinum sunnudagin millum VB og Tjaldur kann fáa avgerandi týdning fyri, hvussu absolutti endaspurturin í Sunset-kappingini fer at síggja út**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað eru framvegis trý lið um boðið at koma í FM-finaluna, sum nú mestsum við vissu verður ímóti Stjørnuni. VB og Tjaldur hava besta møguleikan, men Neistin er framvegis væl við.

Sunnudagin bresta VB og Tjaldur saman í høllini á Vágseiði, og úrslitið av tí dystinum kann gerast avgerandi fyri, hvør verður hin finalisturin hjá fremstu hondbóltskvinnunum.

Vinnur VB, er støðan hjá teimum í Vági sera góð, tí tá eru trý stig niður til næsta liðið, samstundis sum bert fýra stig tá eru eftir at spæla um. Ein VB-sigur kann mestsum manna FM-finaluna.

Hinvegin er kappingin framvegis sera opin, um Tjaldur vinnur dystin í Vági, tí tá er framvegis tætt millum liðini, og tá kunnu úrslitini í teimum báðum síðstu umførunum gera endaspurtin serstakliga spennandi.

Higartil í ár hevur Tjaldur megnað at bitið væl frá sær ímóti VB, men av tí at dysturin hesa ferð er í Vági, har VB millum annað herfyri koppaði Stjørnuni, má VB metast sum ein lítil favorittur.

### Tveir favorittar

Neistin liggur, sum sagt, eitt lítið petti aftan fyri hini bæði, men hevur framvegis møguleikan at sleppa upp í part. Tað treytar tó, at onnur úrslit lagað seg bæði ein og annan veg, men til fyrimuns fyri Neistan.

Hesa ferð er Neistin partur av grannauppgerð í høvuðsstaðnum, har mótstøðuliðið er Kyndil, sum allan veturin hevur verið botnlið og enn einki stig hevur fingið. Eingin ivi er um, at her er Neistin stórfavorittur.

Oddaliðið úr Klaksvík skal spæla á útivølli ímóti StÍF, sum kanska ikki hevur fingið so nógv stig til høldar, men kortini hevur víst styrki. Eitt nú við javnleiki ímóti Tjaldri sunnudagin.

Stjørnan er tó favorittur á Skála, og sjálvt um StÍF skuldi endurtikið sín góða innsats frá Tjaldursdystinum og fingið stig, er ein møguligur stigamissur neyvan katastrofalur fyri klaksvíkskvinnur.

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Stjørnan | 17 | 13 | - | 1 | - | 3 | 447 | 359 | 88 | 27 |
| 2 VB | 17 | 12 | - | 0 | - | 5 | 493 | 400 | 93 | 24 |
| 3 Tjaldur | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 465 | 394 | 71 | 23 |
| 4 Neistin | 17 | 9 | - | 3 | - | 5 | 445 | 415 | 30 | 21 |
| 5 StÍF | 17 | 3 | - | 1 | - | 13 | 416 | 505 | -89 | 7 |
| 6 Kyndil | 17 | 0 | - | 0 | - | 17 | 296 | 489 | -193 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VÍF *) | 16 | 13 | - | 0 | - | 3 | 448 | 413 | 35 | 26 |
| 2 H71 | 17 | 11 | - | 0 | - | 6 | 451 | 389 | 62 | 22 |
| 3 Neistin *) | 16 | 10 | - | 0 | - | 6 | 470 | 438 | 32 | 20 |
| 4 StÍF | 17 | 7 | - | 2 | - | 8 | 407 | 417 | -10 | 16 |
| 5 Kyndil | 17 | 4 | - | 2 | - | 11 | 401 | 453 | -52 | 10 |
| 6 KÍF | 17 | 3 | - | 0 | - | 14 | 401 | 468 | -67 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | t | sett | sett | munur | stig |
| 1 SÍ | 17 | 15 | - | 2 | 48 | 22 | 26 | 19 |
| 2 Fleyr | 17 | 10 | - | 7 | 37 | 28 | 9 | 13 |
| 3 Mjølnir | 17 | 10 | - | 7 | 31 | 30 | 1 | 12 |
| 4 ÍF | 16 | 9 | - | 7 | 33 | 26 | 7 | 12 |
| 5 Dráttur | 16 | 9 | - | 7 | 36 | 30 | 6 | 11 |
| 6 KÍF | 17 | 5 | - | 12 | 29 | 41 | -12 | 7 |
| 7 TB | 16 | 0 | - | 16 | 4 | 48 | -44 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | | | | | vunnin | tapt | sett- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | t | sett | sett | munur | stig |
| 1 ÍF | 11 | 10 | - | 1 | 32 | 12 | 20 | 15 |
| 2 SÍ | 11 | 6 | - | 5 | 24 | 21 | 3 | 8 |
| 3 Mjølnir | 11 | 3 | - | 8 | 16 | 29 | -13 | 6 |
| 4 Fleyr | 11 | 3 | - | 8 | 16 | 26 | -10 | 3 |

# Kyndil kann sløkkja Neistan

**Dysturin hjá Neistanum sunnudagin ímóti grannunum úr Kyndli má og skal vinnast, um Neistin framvegis skal vera við í kappingini um seinna finaluplássið.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað er ongantíð lætt at spáa um úrslitið av grannauppgerðum, og dysturin á Hálsi í Havn sunnudagin er einki undantak. Neistin hevur á pappírinum væl betra liðið, men kanska ikki kanna sær bitan frá Kyndli, fyrr enn hann er svølgdur.

Og okkurt bendir á, at Kyndil vil leggja nógv fyri sunnudagin, so tað við sigri skal eydnast at forða Neistanum at koma í finaluna ímóti VÍF. At so H71 fær finaluplássið í staðin, ger neyvan Kyndli mun.



*Kyndil kann sunnudagin oyðileggja finaluvónirnar hjá grannunum úr Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir dystirnar sunnudagin segði ein av Kyndils-spælarunum, Torvald Abrahamsen, at »vit skulu í øllum førum syrgja fyri, at Neistin ikki kemur í finaluna.«

Um Kyndil hevur neyðugu styrkina til at hótta Neistan, kann vera ein opin spurningur, men hvørki av liðunum vísti tað stóra fyri viku síðani, tá bæði taptu sínar dystir. Nú er so nýggjur dystur og alt kann henda.

### Veikari mótstøðulið

Oddaliðið úr Vestmanna, sum longu stendur við hálvumøðrum beini í finaluni, skal á Skála spæla ímóti StÍF, sum ikki hevur nakað meira at spæla fyri – og kanska tí kann gera ein vørr.

Men VÍF má greitt sigast at vera favorittur í dystinum, har eitt stig kann verða nóg mikið til ikki bert at staðfesta finaluplássið, men eisini at geva heimadyst í einar møguligari triðju finalu.

H71, sum í løtuni sær út til at vera á veg í finaluna saman við VÍF, tekur á heimavølli ímóti KÍF, sum – eins og StÍF – einki hevur at spæla fyri. Hinvegin skal H71 royna at tryggja seg, og tað má eisini roknast við, at hoyvíkingar megna at gera ímóti kollfirðingum.


### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 Stjørnan | 17 | 13 | - | 1 | - | 3 | 447 | 359 | 88 | 27 |
| 2 VB | 17 | 12 | - | 0 | - | 5 | 493 | 400 | 93 | 24 |
| 3 Tjaldur | 17 | 10 | - | 3 | - | 4 | 465 | 394 | 71 | 23 |
| 4 Neistin | 17 | 9 | - | 3 | - | 5 | 445 | 415 | 30 | 21 |
| 5 StÍF | 17 | 3 | - | 1 | - | 13 | 416 | 505 | -89 | 7 |
| 6 Kyndil | 17 | 0 | - | 0 | - | 17 | 296 | 489 | -193 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 VÍF *) | 16 | 13 | - | 0 | - | 3 | 448 | 413 | 35 | 26 |
| 2 H71 | 17 | 11 | - | 0 | - | 6 | 451 | 389 | 62 | 22 |
| 3 Neistin *) | 16 | 10 | - | 0 | - | 6 | 470 | 438 | 32 | 20 |
| 4 StÍF | 17 | 7 | - | 2 | - | 8 | 407 | 417 | -10 | 16 |
| 5 Kyndil | 17 | 4 | - | 2 | - | 11 | 401 | 453 | -52 | 10 |
| 6 KÍF | 17 | 3 | - | 0 | - | 14 | 401 | 468 | -67 | 6 |

*) Kappingarnevndin hevur ógildað úrslitið av dystinum millum Neistan og VÍF tann 18. januar, og tí er hesin ikki roknaður við á stigatalvuni


### Dystir og hagtøl

**Eikligan, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7/3 | ÍF-KÍF | Kambsdalur | 14.00 |
| 7/3 | Dráttur-TB | Giljanes | 14.00 |
| 8/3 | TB-Mjølnir | Trongisvágur | 14.00 |

**Eikligan, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7/3 | SÍ-ÍF | Sørvágur | 14.00 |
| 7/3 | Mjølnir-Fleyr | Klaksvík | 14.00 |

**Sunset-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8/3 | StÍF-Stjørnan | Klaksvík | 14.30 |
| 8/3 | Neistin-Kyndil | Tórshavn | 14.30 |
| 8/3 | VB-Tjaldur | Vágur | 15.00 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 8/3 | StÍF-VÍF | Skála | 16.00 |
| 8/3 | Neistin-Kyndil | Tórshavn | 16.00 |
| 8/3 | H71-KÍF | Hoyvík | 16.00 |